

# Lestrarhandbók fyri námsfrøðinga- og læraralesandi

1. útgáva 2009

# Yvirlit

**Um handbókina** ... **1**

**Kort av skúlanum** ... **2**

**Hent at vita um Læraraskúlan** ... **6**

Kunning ... 6

Skrivstovan ... 6

Lestrarstuðul ... 6

Matstovan ... 6

Kostnaðir ... 7

**Útbúgvingarnar** ... **7**

Námsfrøðingaútbúgvingin ... 8

Læraraútbúgvingin ... 9

**Ársyvirlit** ... **10**

Heystið 2009 ... 10

Várið 2010 ... 11

**At vera lesandi** ... **12**

Fulltíðarlestur og møtiskylda ... 12

Undirvísing og lestur ... 12

Góð lestrarsiðvenja ... 13

**Upggávusløg og metingarhættir** ... **13**

**Lestrarmøguleikar á FLSK og í nærumhvørvinum** ... **14**

Bókasøvn ... 14

Teldur og tøkni ... 15

**Lestrarvegleiðingin** ... **15**

**Starvsfólk** ... **16**

Kápumynd: Poul Horsdal

# Um handbókina

Góðu lesandi. Hjartaliga vælkomin á Føroya læraraskúla. Vónandi verður lestrartíðin góð, stimbrandi og lærurík. Henda handbók er ætlað at geva tykkum eitt lætt og greitt yvirlit um lestur tykkara á Føroya læraraskúla, og um viðurskifti, ið eru lestri tykkara viðkomandi. Hetta er fyrsta útgáva av handbókini, og verður hon ment so við og við.

Eitt sindur um hvussu handbókin er skipað. Fyrst eru nakrir hentir upplýsingar um skúlan. Síðani eru útbúgvingarnar á skúlanum lýstar. Fyri at tit kunnu fáa eina so góða byrjan á lestrinum sum møguligt, hava vit savnað nøkur góð ráð um at vera lesandi á einum hægri lærustovni. Eisini finna tit eitt yvirlit yvir teir mest vanligu eftirmetingarhættirnar á skúlanum. Bókin endar við ymsum upplýsingum um hvørjir lestrarmøguleikar, so sum bókasavn og tøkni, eru til taks á skúlanum. Aftast er eitt yvirlit yvir starvsfólkini á skúlanum.

# Kort av skúlanum

Føroya Læraraskúli - ovara hædd






1. Íbúð 2 (miðíbúðin)
2. Íbúð 1
3. Bókasavnið
4. Aulan
5. Rektarin, skrivstova
6. Skrivstova skúlans
7. Lærarastovan
8. Stova 52
9. Rúm 53, skrivstova (undirvísingarleiðarar)
10. Stova 54
11. Stova 55
12. Stova 56
13. Lestrarvegleiðarin, skrivstova
14. Evnisstovan
15. Alisfrøði, royndarstova
16. Alisfrøði, stova
17. Evnafrøði, royndarstova
18. Lívfrøðistovan
19. Stova 62
20. Stova 63
21. Stova 64
22. Instrumenthøli
23. Sangstovan
24. Fimleikarhøllin

# Føroya Læraraskúli - niðara hædd




25. Kostdeild / skrivstovur
26. Matstovan
27. Heimkunnleiki
28. Drama
29. Smíðstovan
24. Fimleikarhøllin

# Hent at vita um Læraraskúlan

## Kunning

Øll lesandi hava hvør sín navnmerkta kliva, sum er í lon 5.

**Heimasíðan** ( www.flsk.fo). Á heimasíðuni finnur tú nógvar hentar upplýsingar, so sum tímatalvur og lestrarætlanir. Her vera boð og onnur kunning, ið viðvíkja øllum skúlanum, løgd út. Tí er tað týdningarmikið at hyggja inn á heimasíðuna við jøvnum millumbilum—minst eina ferð um vikuna.

**First Class stevnurnar.** Øll lesandi fáa við lestrarbyrjan útflýggjað teldupostaddressu, brúkaranavn,  loyniorð. First Class verður brúkt sum samskiftisamboð ímillum lærarar og lesandi.  Hvør flokkur hevur eina stevnu á First Class, har kunning og boð til allan flokkin verða løgd. Lesandi kunnu ikki taka sum givið, at skúlin samskiftir við tey umvegis aðrar privatar e-mail addressur.

Á gongini í Lon 5, uttanfyri skrivstovuni, er ein talgild uppslagstalva, har kunningarskriv og onnur uppsløg, ið koma á skúlan, verða løgd. Matskránna hjá matstovuni finnur tú her. Her liggja eisini ársætlanir, navnalistar o.a.

## Skrivstovan

Skrivstovan er í lon 5 og er opin gerandisdagar frá kl. 7:30 til kl 15:00. Tlf.359400
Á skrivstovuni fáast kort til kopimaskinurnar til keyps.

## Lestrarstuðul

Umsóknarbløð til lestrarstuðul og lán fáast á skrivstovuni. Lesið meira um stuðulsmøguleikar á www.studul.fo

## Matstovan

Matstovan á lærarskúlanum er í niðaru hædd í lon 6. Hetta er eitt gott stað at hittast, arbeiða í bólkum og fáa sær eina máltíð ella ein kaffimunn. Men havast má í huga, at kantinan er vinnurekandi. Tí skal matur uttanífrá ikki verða etin á matstovuni (tó kann matpakkin heiman verða etin her). Matstovan er opin somu tíðir sum skrivstovan er opin.



## Kostnaðir

Kostnaðurin fyri túrin í innleiðsluvikuni er kr. 200 og skal verða goldin á skrivstovuni mánadagin 17. aug. og í seinasta lagi fyrrapartin týsdagin 18. aug.

Lestrargjaldið er sambært roknskaparreglugerð fyri Føroya lærarskúl, sum er góðkend av MMR. Tað er kr. 500 og skal verða goldið í seinasta lagi áðrenn 1. oktober 2009. Hetta er gjald fyri avrit, o.líkn., ið undirvísarar tykkara geva tykkum gjøgnum árið.

Hetta eru kravd gjøld, og tey, ið ikki gjalda, verða skuldskrivað á Gjaldstovuni.

# Útbúgvingarnar

Á Føroya lærarskúla eru tvær útbúgvingar: lærarútbúgving og námsfrøðingaútbúgving. Lærarútbúgvingin hevur verið síðani 1870 og námsfrøðingaútbúgvingin frá 1986. Føroya lærarskúli er upprunaliga danskur, men varð yvirtikin av Føroya landsstýri  í 1988.

Á vári 2008 samtykti Føroya løgting eitt lógaruppskot, sum førdi við sær, at í august 2008 legði Føroya lærarskúli saman við Fróðskapasetri Føroya og Sjúkrarøktarfrøðiskúla Føroya. Samstundis broyttust útbúgvingarnar til BA –lestur (bachelorútbúgvingar), sum eru skipaðar eftir Bologna sáttmálanum við ECTS-stigum. Tískil er í løtuni (aug. 2009) ein skiftistíð við tveimum útbúgvingarskipanum: Tann eldra skipanin og nýggja BA-skipanin. Lesandi í 3. og 4. flokkunum lesa eftir teirri eldru skipanini.

Niðanfyri eru yvirlit yvir nýggju námsfrøðinga- og lærarútbúgvingarnar. Av tí at nýggju útbúgvingarnar eru í einari royndarskipan, kunnu ymsu skeiðini broytast nakað frá einum árið til annað.

Til hvørt skeið hoyrir ein ECTS- skeiðslýsing og ein nágreinilig lesiætlan. Í lesiætlanini verður kunnað um mál og innihald, bókmentalista, undirvísingarhættir og undirvísarar, vegleiðing og eftirmetingarhættir, innlatingartíð og stað og slag av eftirmetingarúrsliti.

## Námsfrøðingaútbúgvingin

**1. ár**

- **Grundleggjandi førleikar**: Námsfrøðingalesandi fara saman við læraralesandi undir lesturin við at ogna sær grundleggjandi lestrar-førleikar og ogna sær vitan, sum øllum tørvar, ið arbeiða við børnum og teirra menning.
- **Kjarnuførleikar**: Síðan savna tey seg um grundleggjandi sálarfrøðiligu, námsfrøðiligu og didaktisku vitanina og amboðini, tey fara at brúka alt yrkislívið á barnagørðum og øðrum stovnum. Seinni fara tey at royna sína vitan í verki á einum stovni.

**2.ár**

- **Kjarnuøki**: Lesturin á 2. ári er savnaður um trý kjarnuøki. Fyrra hálvárið eru tvey stór skeið: 1) Mál, mentan og siðsøga, og 2) Menniskja, stovnur og samfelag. Seinna hálvárið venda tey aftur til sálarfrøði, námsfrøði og almennan didaktikk, men nú við áherðslu á serøkið.

**3. ár**

- **Fyrsta linjan**: Triðja árið hugsavna tey lesandi seg um ta fyrru av tveimum linjum, sum t.d. tað kreativa barnið, skúlatilbúgving, og heilsa, kroppur og rørsla.
- **Bacheloruppgávan**: Síðsti fjórðingurin av triðja lestrarári er settur av til bacheloruppgávuna, tá ið tey lesandi granska í evnum, ið eru námsfrøðini viðkomandi.

**4.ár**

- **Onnur linjan**: Tey lesandi velja sær seinnu linjugreinina, og lestrarleisturin er tann sami sum á triðja ári.
- **At gerast námsfrøðingur**: Síðstu mánaðirnar av útbúgvingini fyrireika tey lesandi seg miðvíst til starvið, sum bíðar eftir teimum, eftir at tey hava fingið prógvið í hondina.



## Læraraútbúgvingin

**1. ár**

- **Grundleggjandi førleikar**: Læraralesandi fara saman við námsfrøðingalesandi undir lesturin við at ogna sær grundleggjandi lestrarførleikar og ogna sær vitan, sum øllum tørvar, ið arbeiða við børnum og teirra menning.
- **Kjarnuførleikar**: Síðani savna tey seg um grundleggjandi sálarfrøðiligu, námsfrøðisligu og didaktisku vitanina og amboðini, tey fara at brúka alt yrkislívið í fólkaskúlunum. Seinni fara tey at royna sína vitan í verki á einum skúla.

**2.ár**

- **Kjarnuøki**: Á øðrum ári savna tey lesandi seg um og fyrireika seg at undirvísa í einum av tveimum breiðum fakøkjum, tí hugvísindaliga ella náttúruvísindaliga.

**3. ár**

- **Fyrsta linjan**: Triðja árið velja tey lesandi sær ta fyrru av tveimum lærugreinum ella arbeiðisøkjum fólkaskúlans at seta seg væl inn í. Tey nema sær ta fakligu vitanina, ið krevst, og fyrireika seg námsfrøðiliga og didaktiskt at undirvísa í lærugreinini. Lestrarætlanirnar, tey menna, royna tey í stuttum skeiðum úti á skúlum.
- **Bacheloruppgávan**: Síðsti fjórðingurin av triðja lestrarári er settur av til bacheloruppgávuna, tá ið tey lesandi granska í evnum, ið eru undirvísingarøkinum viðkomandi.

**4.ár**

- **Onnur linjan**: Tey lesandi velja sær ta seinnu linjugreinina, og lestrarleisturin er tann sami, sum á triðja ári.
- **At gerast lærari**: Síðstu mánaðirnar av útbúgvingini fyrireika tey lesandi seg miðvíst til starvið, sum bíðar eftir teimum, eftir at tey hava fingið prógvið í hondina.

# Ársyvirlit

## Heystið 2009

| Aug | | Sep | | Okt | | Nov | | Des | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | | Vísinda- | | | | 1 | | Lívs- | |
| 2 | | ástøði | | | | Skapandi | 45 | áskoðan | |
| 3 | | | | 3 | | læra | | og | |
| 4 | | | | 4 | | | | siðalæra | |
| 5 | | 5 | | Barna- og | 41 | | | 5 | |
| 6 | | 6 | | Ungdóms- | | | | 6 | |
| 7 | | Vísinda- | 37 | mentan | | 7 | | Lívs- | 50 |
| 8 | | ástøði | | | | 8 | | áskoðan | |
| 9 | | | | | | Lívs- | 46 | og | |
| 10 | | | | 10 | | áskoðan | | siðalæra | |
| 11 | | | | 11 | | og | | | |
| 12 | | 12 | | | | siðalæra | | 12 | |
| 13 | | 13 | | | | | | 13 | |
| 14 | | Vísinda- | 38 | Heystfrí | | 14 | | Lívs- | 51 |
| 15 | | ástøði | | | | 15 | | áskoðan | |
| 16 | | | | | | Lívs- | | og | |
| Innleiðslu- | 34 | | | 17 | | áskoðan | | siðalæra | |
| skeið | | | | 18 | | og | | | |
| | | 19 | | Skapandi | 43 | siðalæra | | 19 | |
| | | 20 | | læra | | | | 20 | |
| | | Barna- og | 39 | | | 21 | | 21 | |
| 22 | | Ungdóms- | | | | 22 | | | |
| 23 | | mentan | | | | Lívs- | 48 | | |
| Føroysk | 35 | | | 24 | | áskoðan | | 24 | |
| stavseting | | | | 25 | | og | | | |
| | | 26 | | | 44 | siðalæra | | Jólafrí | |
| | | 27 | | | | | | | |
| | | Barna- og | 40 | Skapandi | | 28 | | | |
| 29 | | Ungdóms- | | læra | | 29 | | | |
| 30 | | mentan | | | | | 49 | | |
| | 36 | | | 31 | | | | 31 | |



## Várið 2010

| Januar | | Februar | | Mars | | Apríl | | Mai | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | **Námsfrøði,** | 5 | **Námsfrøði,** | 9 | 1 | | 1 | |
| 2 Jólafrí | | sálarfrøði og | | sálarfrøði og | | 2 Páskafrí | | 2 | |
| 3 | | almennur | | almennur | | 3 | | Námsfrøði, | 18 |
| Samskifti | | didaktikkur | | didaktikkur | | 4 | | sálarfrøði og | |
| | | | | | | 5 má | 14 | almennur | |
| | | 6 | | 6 | | 6 tý | | didaktikkur | |
| | | 7 | | 7 | | Námsfrøði, | | | |
| | | Námsfrøði, | 6 | Námsfrøði, | 10 | sálarfrøði og | | 8 | |
| 9 | | sálarfrøði og | | sálarfrøði og | | almennur ... | | 9 | |
| 10 | | almennur | | almennur | | 10 | | Námsfrøði, | 19 |
| | 2 | didaktikkur | | didaktikkur | | 11 | | sálarfrøði og | |
| Samskifti | | | | | | Námsfrøði, | 15 | almennur | |
| | | 13 | | 13 | | sálarfrøði og | | didaktikkur | |
| | | 14 | | 14 | | almennur | | | |
| | | Námsfrøði, | 7 | Føstu-mánadagur | 11 | didaktikkur | | 15 | |
| 16 | | sálarfrøði og | | Námsfrøði, | | | | 16 | |
| 17 | | almennur | | sálarfrøði og | | 17 | | Námsfrøði, | 20 |
| | 3 | didaktikkur | | almennur | | 18 | | sálarfrøði og | |
| Samskifti | | | | didaktikkur | | Námsfrøði, | 16 | almennur | |
| | | 20 | | 20 | | sálarfrøði og | | didaktikkur | |
| | | 21 | | 21 | | almennur | | | |
| | | Námsfrøði, | 8 | Námsfrøði, | 12 | didaktikkur | | 22 | |
| 23 | | sálarfrøði og | | sálarfrøði og | | | | 23 | |
| 24 | | almennur | | almennur | | 24 | | 24 | |
| Samskifti | 4 | didaktikkur | | didaktikkur | | 25 Flaggdagur | | Námsfrøði, | |
| | | | | | | | 17 | sálarfrøði og | |
| | | 27 | | 27 | | | | almennur | |
| | | 28 | | 28 | | | | didaktikkur | |
| | | | | | 13 | | | 29 | |
| 30 | | | | | | Dýri Biðidagur | | 30 | |
| 31 | | | | **Páskafrí** | | | | má 31 | **22** |

Starvslæran 1. árið er tætt tengd at skeiðunum í sálarfrøði, námsfrøði og almennum didaktikki. Ein týðandi partur av hesum skeiðum er eygleiðingardagar á skúlum og stovnum. Læraralesandi fara í starvslæru í 3 vikur og námsfrøðingalesandi í 6 vikur.

# At vera lesandi

## Fulltíðarlestur og møtiskylda

Útbúgvingarnar á Føroya læraraskúla eru fulltíðarlestur, t.e., at lesandi skulu rokna við at brúka umleið 40 tímar um vikuna at lesa, granska, skriva, ganga til fyrilestrar, bólkaarbeiði o.a.

Á skúlanum er møti- og luttøkuskylda. T.e., at lesandi hava skyldu at koma til fyrilestrar og aðra skipaða undirvísing og at verða virkin í bólkaarbeiði, o.líkn.

## Undirvísing og lestur

Ein týðandi munur ímillum at vera næmingur á einum fólka- ella miðnámsskúla og at vera lesandi á einum hægri lærustovni er, at stórur dentur verður lagdur á sjálvstøðugan lestur, og tí eru lutvíst fáir tímar av skipaðari undirvísing í eini floksstovu.

Vanliga eru umleið 12-15 skúlatímar um vikuna í skipaðari undirvísing. Harafturat skal roknast við nøkrum tímum í bólkaarbeiði, o. líkn. Á flestu skeiðunum hjá 1. árs lesandi er skipaða undirvísingin løgd mánadag, mikudag og fríggjadag. Tó, kann væntast at undirvísingin á summum skeiðum liggur aðrar dagar.

Hinir 20-25 tímarnar um vikuna eru ætlaðir til sjálvstøðugan lestur, at lesa pensum, skriva uppgávur, fyrireika seg til próvtøkur o.líkn. Lesandi skulu ikki vænta at megna at standa eitt skeið, um tey ikki seta hesa tíð av til lesturin.

Ein grundleggjandi táttur í hægri lestri er at útbúgving er ikki nakað ein fær ella sum onnur hava skyldu at geva einum. Lesandi koma á hægri læristovnar at ogna sær sjálvum kunnleika og førleikar. Hetta setur stór krøv. Tað merkir, at ein fortreyt fyri at fáa væl burtur úr lestrinum er at arbeiða sjálvstøðugt—frá fyrsta degi leggja sín egna lestur til rættis og seta tíðina av, ið krevst fyri at gerast ein góður námsfrøðingur ella lærari.



## Góð lestrarsiðvenja

Leggið tykkum eftir at møta til tíðina. Teldan er eitt hent amboð í lesnaðinum, men tað er ringur siður at sita og spæla spøl, reika á netinum, kjatta, o. líkn. undir fyrilestrum. Minnist eisini til at rudda upp eftir tykkum sjálv aftan á fyrilestrar.

# Uppgávusløg og metingarhættir

Ymsir metingarhættir vera nýttir. Eftirmeting fer fram í bólki ella einsæris. Hetta verður kunnað um í skeiðslýsingunum og lesiætlanunum til hvørt skeið.

Teir metingarhættir, sum vit serliga nýta, eru:

- Stórar og smáar spurdómsstýrdar skrivligar uppgávur
- Stórar og smáar skrivligar uppgávur við ásettum uppgávuorðingum
- Fakligar ritroyndir
- Synopsur
- Verkligt arbeiði
- Munnligar framløgur við og við ongari opponering
- Munnligar próvtøkur
- Loggbók
- Starvslæra

Tey lesandi fáa nærri vegleiðing um ymisku uppgávusløgini, áðrenn uppgávurnar skulu gerast. Ein góð og praktisk bók um hvussu ein uppgáva verður skrivað er *Den gode oppgave* eftir L. Rienecker og P.S. Jørgensen. Útgivið hevur Forlaget Samfundslitteratur í 2005. Ymiskt um uppgávuskriving verður eisini lagt út á heimasíðu skúlans

Vísindaligir tekstir eru høvuðsgrundarlagið undir øllum skrivligum uppgávum. Hvørja ferð, tekstir verða brúktir, skulu kelduávísingar verða settar upp. Kelduávísingarnar verða settar upp eftir APA tilvísingarlistanum, sum er á heimasíðu skúlans, www.flsk.fo

Eftirmetingarúrslitið eru annaðhvørt staðið/ikki staðið ella eitt próvtal. Enn brúka vit 13 próvtalsstigan, men fara at brúka nýggja stigan í august 2010, tá ið hann væntandi verður settur í gildi í Føroyum.

Um lesandi ikki standa, fáa ávikavist ikki staðið, 03 ella 5, verður møguleiki at royna umaftur. Lesandi kunnu royna umaftur tvær ferðir.

# Lestrarmøguleikar á FLSK og í nærumhvørvinum

## Bókasøvn

Bókasavnið á skúlanum hevur eitt breitt úrval av bókum um lærara- og námsfrøðiøkið, og eisini aðrar fakbókmentir. Bókasavnið er ein týdningarmikil liður í lesnaðinum, og tí er umráðandi, at lesandi gagnnýta tað.

Bókasavnið er opið vanliga skúlatíð. Eitt yvirlit yvir, nær bókavørður er á bókasavninum hongur á rútinum vinstrumegin hurðina á bókasavninum.

Í august mánaði fáa lesandi lánarakort. Bøkur kunnu verða læntar út ein mánað í senn.

Er bókavørður ikki til staðar, tá ið lænt verður, ber til at brúka sjálvlánið.

Bøkurnar á bókasavninum eru talgilt skrásettar, og tú kanst leita eftir bókum á http://secure04.elibdrift.dk/fao-lararaskulin.html (eitt leinki til bókasavnsgrunnin er á heimasíðu skúlans). Fleiri onnur bókasøvn, t.d. Landsbókasavnið, bókasøvnini á Fróðskaparsetrinum og Býarbókasavnið, eru eisini skrásett í hesum grunni.

Onnur bókasøvn, ið lesandi hava atgongd til, eru m.a.:

Landsbókasavnið, www.flb.fo
Landsmiðstøðin, www.lms.fo
Býarbókasavnið, www.bbs.fo

Á áður nevnda bókasavnsgrunni eru eisini fleiri onnur bókasøvn.



## Teldur og tøkni

Í lon 5 eru fleiri teldur, ið lesandi kunnu nýta. Við lestrarbyrjan fáa øll lesandi útflýggjað búkaranavn og loyniorð, sum gevur atgongd til telduskipanina.

Lesandi hava møguleika at læna ymiska tøkniútgerð, s.s. teldur, fototól, upptøkutól, diktafonir. Tað gerst við at venda sær til Ásu á skrivstovuni ella Mikkjal. Lesandi hava ábyrg av, at lánini verða skrásett og latin innaftur í sama standi og til avrádda tíð.

# Lestrarvegleiðingin

Í lestrarvegleiðingini kanst tú fáa vegleiðing og stuðul í ymiskum persónligum viðurskiftum í sambandi við lesturin. Øll vegleiðing fer fram í trúnaði. Tú finnur lestrarvegleiðingina innast á gongini. Sí kort á s. 2-3. Lestrarvegleiðingin er opin

týsdag 8:00-12:15
hósdag 8:00-12:15

Til ber eisini at senda teldupost á paulina@flsk.fo ella ringja á tlf. 219748

## Starvsfólk

| Navn | Arbeiðsøki | e-mail |
|---|---|---|
| Árni Dahl | Føroyskt | fannir@flsk.fo |
| Noomi í Dali | Handarbeið i | noomi@flsk.fo |
| DagbjarturDebes | Inspektor, søga | ddebes@flsk.fo |
| Firouz Gaini | Mannfrøði | firouz@flsk.fo |
| Anna Gásadal | Ítróttur | anna@flsk.fo |
| Poul F. Guttesen | Kristni | pguttesen@flsk.fo |
| Hans H. Hansen | Undirvísingarleiðari, sálarfrøði | hans@flsk.fo |
| Jóannes Hansen | Rektari | joannes@flsk.fo |
| Sjúrður Hansen | Smíð | sjurdur@flsk.fo |
| Janus Jensen | Undirvísingarleiðari, námsfrøði | janus.jensen@skulin.fo |
| Jógvan Jensen (Egga) | Ítróttur | egga@flsk.fo |
| Gudna á Rógvi Joensen | Heimkunnleiki | gudna.a.rogvi@skulin.fo |
| Johanna L. Joensen | Námsfrøði | johanna@flsk.fo |
| Jóni Johannesen | Húsavørður | joni-johannesen@hotmail.com |
| Búgvi M. Kristiansen | Netumsitari | bugvi@ung.fo |
| Herluf Lützen | Tónleikur | herluf@flsk.fo |
| Fróði Madsen | Sálarfrøði | lukelukather@hotmail.com |
| Kurt Madsen | Náttúruvísindi | kurtma@flsk.fo |
| Karolina Matras | Máldidaktikkur | karolina.matras@skulin.fo |
| Jonhard Mikkelsen | Føroyskt, enskt | jonhard@sprotin.fo |
| Mikkjal Mikkelsen | Danskt, geografi | mikmik@flsk.fo |
| Katrin Næs | Føroyskt | knaes@kallnet.fo |
| Andre Niclasen | Týskt | an@post.olivant.fo |
| Ása Olsen | Skrivstova | asa@flsk.fo |
| Karen Breiner Petersen | Kristni | breiner@flsk.fo |
| Paulina Poulsen | Lestrarvegleiðari, myndlist | paulina@flsk.fo |
| Sunleif Rasmussen | Tónleikur | sunras@skulin.fo |
| Einar Skála | Húsavørður | |



Frælsið 20 | Tlf. +298 35 94 00 | Faks. +298 316 316 | flsk@flsk.fo